Føroyingur fremstur í Íslandi:

# – Eingin trúði okkum

**Íslendskir fjølmiðlar hava kosið 39 ára gamla Jákup á Dul Jacobsen ársins ígongdsetara í Íslandi. Heiðurslønin er fyri avrik hansara í handilslívinum, har hann rættiliga hevur gjørt vart við seg sum ein undangongumann. Hann hevur neyðuga dirvi at fara undir nakað nýtt, ið eingin íslendingur trúði bar til**

HEIÐURSLØN
*Stefan í Skorini*

Týsdagin var samkoma á Grand Hotel í íslendska høvuðsstaðnum Reykjavík, har 150 av landsins fremstu fólkum vóru komin saman at heiðra ársins vinnulívsmann og ársins undangongumann.

Føroyingurin Jákup á Dul Jacobsen varð valdur frumkvøðull ársins ella ársins undangongumaður.

– Eg helt, at tað var ein joke, tá eg varð ringdur upp fyri nøkrum døgum síðani og fekk at vita, at eg varð ársins undangongumaður, sigur Jákup.

Jákup leggur dent á, at hann ikki er einsamallur um at reka fyritøkuna, men at hann er á einum góðum liði av føroyingum. Sameigari er Jákup (Poli) Purkhús, og rakstrarleiðari er Niels Stórá. Saman hava teir skapt eina blómandi handilsketu í Íslandi, Kanada og Føroyum.

## Í fínum felagi

Henda virðislønin varð latin á fyrsta sinni í 1996. Hetta er fyrstu ferð, at ein útlendingur verður heiðraður.

Við hesum er Jákup komin í fínt felag. Í 1996 var Kári Stefánsson frá DeCode, sum granskar í genum, frumkvøðull ársins og í fjør var tað Ríkisstjórn Íslands.

– Eg kann ikki vera annað enn errin av, at teir hava valt meg, sigur Jákup.

Jákup sigur, at hann hevur verið nógv í sambandi við íslendsku fjølmiðlarnar seinastu dagarnar, og áhugin fyri heiðurslønini er stórur. Hann hevur verið í bløðum, sjónvarpi og útvarpi.

Tað eru teir tríggur miðlarnir DV, Støð 2 og Viðskiptablaðið, sum standa fyri at finna vinnarar og lata virðislønirnar.



*Jákup á Dul Jacobsen er ársins undangongumaður í Íslandi. Hann hevur saman við øðrum føroyingum fimm handlar og tvær stórar handilsmiðstøðir í grannalandinum fyri norðan*

Saman við sameigara sínum hevur Jákup tíggju handlar í handilsketuni. Fimm av teimum eru í Íslandi, fýra í Reykjavík og ein á Akureyri. Í Kanada lat fyrsti handilin upp í 1996, og har eru nú fýra handlar, meðan tann eini er í Havn.

– Eingin í Íslandi hevði roynt seg á hesum økinum, sum vit eru á, og vit fingu frið í nógv ár, tí eingin trúði, at tað fór at bera seg, sigur Jákup.

– Vit vóru eisini hepnir at byrja við, tí vit fingu góð høli, sum liggja væl fyri.

Eini 120 fólk starvast dagliga í handlunum hjá Jákupi í Íslandi. Í Kanada arbeiða 60 fólk og í Havn eini 25 fólk.

Jákup hevur tætt samstarv við Jysk Sengetøjslager í Danmark. Teir keypa umleið ein helming av sínum vørum saman við donsku fyritøkuni.

## Vent í holuni

Umframt handlarnar hava teir eisini tvær stórar handilsmiðstøðir í Íslandi, og tað er eisini á hesum økinum, at Jákup veruliga hevur gjørt vart við seg.

Í november lat ein nýggj handilsmiðstøð upp á Akureyri, og tað er kanska ein av orsøkunum til, at Jákup varð heiðraður í ár, Handilsmiðstøðin í Reykjavík lat upp fyri trimum árum síðani.

– Tá vit fóru undir at byggja handilsmiðstøðina í Reykjavík, var eingin, sum trúði uppá ætlanina, og eingin vildi leiga frá okkum. Stutt undan at vit skuldu lata upp, var tað hinvegin eingin, ið tordi at lata vera. Allir vildu knappliga vera við, sigur Jákup.

Jákup leggur afturat, at ætlanirnar hjá teimum hava verið væleydnaðar, og at leigararnir eisini eru væl nøgdir.

Jákup lat sín fyrsta handil upp í 1986 í Føroyum, og tað var Skemman. Árið eftir valdi hann eisini at royna seg í Íslandi, tá tann fyrsti handilin lat upp har yviri.

Síðani er virksemið bara økt so hvørt, og nú hevur Jákup gjørt vart við seg sum ein av fremstu vinnulívsmonnunum í Íslandi, hóast hann ikki er serliga stinnur í íslendskum.

Teir leggja seg eftir at hava útreiðslurnar so lágar sum til ber. Tískil er tað ikki so fínt í handlunum, men teir hava hinvegin prísleguna so lága sum gjørligt. Handlarnir eru sum oftast stórir og krevja nógv gólvpláss.

## Ísland nógv ment

Jákup flutti til Íslands í 1994, tá virksemið hansara av álvara fór at økjast.

– Ísland er so ómetaliga nógv ment tey seinastu árini á øllum økjum. Okkara fyritøka veksur við at vera í einum tryggum umhvørvi, sum blómar, sigur Jákup.

– Fyribils royna vit tó at halda okkum til hetta økið, tí tað kann gerast ov nógv.

Jákup á Dul Jacobsen var til skips í eini níggju ár, áðrenn hann legðist uppi og fór undir at selja dýnur og koddar.

Hann er giftur Eriku Jacobsen, fødd Lómstein, og saman eiga tey fimm børn, tríggjar gentur og tveir dreingir.

Teimum dámar væl í Íslandi, og Jákup sigur, at íslendingar eru ógvuliga positivir yvirfyri føroyingum.

Fjølmiðlarnir í Íslandi hava fingið frænir av øðrum ætlanum hjá Jákupi, sum liggja longri frammi í tíðini.

Tað er ein skrivstovubygningur í sekstan hæddum, og so hevur hann eisini ætlanir um onkran handilsbygning í umbúna. Enn er tó ikki greitt, um tað verður veruleiki.



# Góðir toskaárgangir á veg



*Nógvur greipufiskur verður avreiddur í hesum døgum. Fiskiveiðieftirlitið sigur, at tað mest eru smærru bátarnir, sum avreiða hendan fiskin*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Tað verður nógvur greipufiskur avreiddur í hesum døgum. Tað kann vera ein ábending um góðar árgangir, siga fiskifrøðinar, meðan Fiskiveiðieftirlitið biður menn ansa eftir**

FISKIVEIÐA
*Edvard Joensen*

Nøgdin av smáfiski, sum avreiddur verður, er vaksin munandi í heyst. Tað er í samsvar við vanliga gongd, men tó vert at ansa eftir.

Tað kann vera bæði gott og ringt, tá nógvar gillur eru ímillum. Men vanligt hevur ikki verið, at veiðimaðurin vil hava tað smáa. Tað hevur ofta verið blakað útaftur, ella í øðrum lagi greipað. Men nú tykist, sum alt verður tikið og avreitt. Og grundin er helst sera einfald. Prísurin er í toppi.

Tøl hjá Fiskamarknaðinum á Toftum vísa, at í heyst er nøgdin á gripufiskinum, toski 5, vaksin munandi seinastu tveir mánaðirnar. Viðmerkjast skal, at ikki bar til at fáa tøl fyri desember, so seinastu avreiðingartølini, vit hava gingið hendur á, eru fyri november mánað.

Men í prosentparti av samlaðu toskaveiðuni liggur toskur 5 - greipufiskur ella gillur, sum hann vanliga verður nevndur - uppi á 10,73% í november, meðan parturin í januar var 4,14 %.

Tað er einki óvanligt í, at smáfiskurin verður fiskaður um heystið. Tí tað er tíðin, hann kemur inn á grunnin. Soleiðis er tað bara. Og tað vísir seg eisini, verður sagt av Fiskiveiðieftirlitinum, at tað eru teir smáu bátarnir, sum avreiða hendan fiskin.

Av Fiskiveiðieftirlitinum verður sagt, at tey hava fingið fráboðanir um, at nøgdin av greipufiskinum er vaksin munandi, og at tey eisini hava kannað hesar fráboðanir.

Til dømis hava fólk frá Fiskiveiðieftirlitinum verið inni á Toftum, har bátar hava avreitt til Fiskamarknaðin, eins og fólk hevur verið umborð á størru línuskipunum, meðan drigið verður.

Fiskiveiðieftilitið sigur, at tað er heilt greitt, at tað eru smærri bátarnir, sum fiska fram við landi, sum fá tann smáa fiskin. Hjá línuskipunum er lutfallið púra í lagi, verður sagt.

So er spurningurin sjálvandi, hvussu gerast skal við tað. Og har verður sagt av Fiskiveiðieftirlitinum, at tey hava heitt á menn um ikki at taka so nógv av hesum smáa. Men einki øki er tó stongt kortini.

Og tað ber heldur ikki til at fara at friða alt sjóøki innan fyri 12 fjórðingar, hóast menn fiska smátt.

Og so leingi prísirnir eru, sum teir eru, verður ivaleyst alt tikið. Nevnast kann, at ein ávísan dag herfyri var meðalprísurin fyri tosk 5, sum er greipufiskurin millum 300 gram og 1 kg., kr. 10,59. So einki løgið er í, at hann verður dripin.

Hinvegin órógvar tað ikki fiskifrøðingarnar, at smáfiskurin verður fiskaður nú. Tað er heilt í tráð við vanliga gongd, og at nøgdin er hampiliga stór nú, passar eisini við tær yngulkanningar, gjørdar vórðu í 1997 og 1998.

Av Fiskirannsóknarstovuni verður sagt, at teirra kanningar av hesum báðum árgangunum siga, at tað var heilt hampiligt, og tað tykist fiskiskapurin nú at prógva.

# Nýggir elektrikkarar



*Fríggjadagin fingu seks mans prógv sum elektrikkarar. Teir eru Hans Arni Davidsen, Toftir, Jóhannes Davidsen Sandavágur, Sonni Eliasen, Fuglafjørður, Leivur Hansen, Norðragøta, Jógvan Jacobsen Kolbeinargjógv og Eyðun Simonsen, Tórshavn. Av teimum fekk Sonni Eliasen eitt máliinstrument frá SEV fyri avbera gott úrslit – hann fekk hægsta karakter.*


HYGG HER

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Brúktir bilar til sølu

| Verksmiðjumerki | km. | mán. | árg. | søluprísur |
|---|---|---|---|---|
| Citroën BX 1,6 Selec. 5h (Sýnaður 11/00) | 55.000 | Aug. | 1992 | 59.000,- |
| Suzuki Baleno Van 1,6LX 3h (Sýnaður 03/00) | 35.000 | Aug. | 1997 | 70.000,- |
| Citroën ZX 1,9D stw. | 74.000 | Nov. | 1996 | 105.000,- |
| Honda Civic 1,5i Vtec 5h | 50.000 | Mai | 1996 | 110.000,- |
| Nissan Patrol pers. 5H | 169.000 | Jan | 1991 | 114.900,- |
| Honda Civic 1,4 LS 3h | 71.000 | Nov. | 1996 | 114.900,- |
| Citroën Xantia 1,9 TD 5h | 126.500 | Apr. | 1996 | 119.000,- |
| Toyota Corolla 2,0 D stw. | 94,500 | Des. | 1996 | 129,900,- |
| Citroën Jumper 2.5 TD 32 | 92.500 | Aug. | 1996 | 132.000,- |
| SEAT Kordoba Vario stw. | 14.000 | Aug. | 1999 | 134.000,- |
| Honda CIVIC 1,5i LS Vtec 3h | 61.000 | Aug. | 1998 | 135.000,- |
| Nissan Primera 2,0 SLX 4h | 25.000 | Aug. | 1997 | 139.000,- |
| Citroën Xantia 2,0 HDi 5h | 75.000 | Jan. | 1999 | 179.000,- |
| Galloper 2,5 TDi 7 pers. 5h | 37.400 | Apr. | 1999 | 215.000,- |
| Citroën Xantia 1,9 TD | 126.500 | Apr. | 1996 | 119.000,- |

OG FLEIRI AÐRAR BRÚKTAR BILAR SO HYGG INN Á GÓLVIÐ OG FÁ EITT GOTT TILBOÐ!

Ford Fiesta 1,3 - 3H
Árg. 11/1994 - kr. 50.000,-

Vælkomin til

CITROËN DaimlerChrysler MITSUBISHI MOTORS
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Sosialurin - 311820